**Útboð**
**av**
**grannskoðan**
**av**
**partafelagnum,**
**sum skal byggja og reka undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy**

Vísandi til løgtingsmál nr. 77/2013 har landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fær heimild at stovna partafelag, hvørs endamál skal vera at gera undirsjóvartunlar millum Streymoy og Eysturoy og millum Streymoy og Sandoy og hartil hoyrandi vegagerð, hava rakstur av tunlunum um hendur umframt aðra vinnu, sum hevur samband við hetta virksemið, bjóðar Fíggjarmálaráðið hervið út grannskoðanina av nevnda felag.

Av tí at grannskoðarin skal veljast á stovnandi aðalfundinum hjá omanfyri nevnda felag, skal útbjóðingin vera avgreidd, áðrenn stovnandi aðalfundin hjá felagnum. Virksemið hjá partafelagnum, sum skal stovnast at reka Eysturoyar- og Sandoyartunnilin, er væl lýst í løgtingsmáli 77/2013.

## Krøv til tilboðið

Tilboðið skal fevna um hesar upplýsingar:

- Navn og skrásetingarnummar hjá grannskoðanarfyritøkuni umframt eina almenna lýsing av førleikunum hjá grannskoðanarfyritøkuni og royndir hennara.
- Nøvn og CV hjá teimum lyklapersónum, sum grannskoðanarfyritøkan knýtir at grannskoðanaruppgávuni.
- Dømi um viðkomandi kundar og uppgávur, sum lyklapersónarnir hava loyst, har Fíggjarmálaráðið fær heimild at venda sær til hesar kundar fyri at fáa møguligt ummæli av lyklapersónunum.
- Kostnaðin fyri árligu grannskoðanina av partafelagnum, og tímaprís fyri aðrar uppgávur, sum møguliga kunnu koma afturat árligu grannskoðanini.

## Vekting av tilboðum

Prísurin vektar 80% og góðska, sum m.a. eru førleikar og royndir hjá lyklapersónunum, vekta 20%.

## Spurningar og freistir

Útboðið er kunngjørt á Keypsportalinum (www.keypsportal.fo) hósdagin tann 10. apríl 2014. Tilboðsgevarar kunnu seta spurningar til útboðið til og við mikudagin tann 16. apríl 2014, kl. 16:00. Spurningarnir skulu vera skrivligir og sendast til mortan@fmr.fo. Spurningarnir verða síðan viðgjørdir og svaraðir í seinasta lagi mikudagin tann 23. apríl 2014. Tilboðini frá tilboðsgevarunum skulu verða Fíggjarmálaráðnum í hendi í seinasta lagi hósdagin tann 24. apríl 2014, kl. 12:00. Vinnarin av útboðnum verður almanna kunngjørdur á Keypsportalinum hósdagin tann 24. mai 2014.